VB-B68 1-1 (0-0)

Bæði VB og B68 mistu

Tað var alla tíðina tætt á Eiðinum, tá VB tók ímóti B68
Mynd: Áki Bertholdsen

Leingi var viljin at vinna minni enn óttin fyri einki at fáa burturúr

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Meistaraliðið úr Vági og toftamenn eru væl við í kappingini um bronsukrónurnar, sum eisini kunnu fara at vísa seg at hava altjóða luttøku við sær.

Hjá báðum pørtum var tað týdningarmikið at fáa fult á Vágseiði sunnudagin, men tað var eisini felags fyri bæði liðini, at tey av øllum alvi vildu byrgja fyri, at mótstøðuliðið fekk mál og harvið fór avstað við øllum trimum stigunum.

Serliga í 1. hálvleiki sást hetta væl. Stríðið um miðvøllin var stórt, nærdystirnir vóru nógvir, og ferðin var ofta góð, men møguleikarnir vóru ikki nógvir í fyrra umfarinum, tá B68 bara hevði Súna Fríða Johannesen á toppinum (Marcello sum higartil í ár bara hevur verið ein skuggi av tí, sum hann vísti í fjør, byrjaði á beinkinum).

Popczynski týdningarmikil

Eftir steðgin kom VB venjarin, Popczynski, á vøllin. Hann hevur verið so mikið skaddur, at hann ikki hevur hildið seg til at spæla.

Hesa ferð setti hann seg sjálvan á vøllin, men VB vildi ikki spenna álopsbogan hægri enn so, enn at hann tók Robert Cieslewic út.

Popczynski setti meiri ferð í framrættaða spælið hjá VB, sum trýsti B68 verjuna, men teir megnaðu ikki at fáa mál hjá Kjartani Nesá, sum hesa ferð vardi toftamálið. Ein stútari dygst framvið málinum var tað næsta.

Í staðin vóru tað gestirnir, sum fingu mál. Marcello, sum var komin á vøllin fyri unga miðvallaran, Jann Inga Petersen, var við í uppspælinum. John Heri Dam sendi væl innfyri úr vinstru, og Súni Fríði Johannesen var fyrstur á og stútaði framvið Bjarna Johansen.

B68 málið hevði við sær, at heimaliðið setti uppaftur meiri trýst á álopsketlarnar. Og tað eydnaðist at javna. Eftir fleiri hornaspørk var Popczynski púra blankur mitt fyri málinum, og so var lag á manni at seta krúllin undir bóltin.

Vágbingar trýstu síðstu løtuna fyri at vinna, men tað var um reppið, at B68 fór við øllum. Súni Fríði Johannesen fekk ein góðan møguleika, men Bjarni Johansen vardi væl fyri í VB málinum.

Dysturin í tølum:

VB-B68 1-1 (0-0)
0-1: Súni Fríði Johannesen 64
1-1: Krzystof Popczynski 80
Dómari: Lassin Isaksen (KÍ)

VB: Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic, Jón Gærdbo, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Palli Augustinussen, Marek Wierzbicki, Tórður Holm, Jón Pauli Olsen – Birgir Jørgensen, Robert Cieslewic

B Kjartan Nesá – Hans Fróði Hansen, Jan Petersen, Messias Perreira – Marlon Jorge, Jann Ingi Petersen, Jan C. Dam, Fróði Benjaminsen, John Heri Dam, Jákup Eli Olsen – Súni Fríði Johannesen

Støðan, danska superligan

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Brøndby	3	3	-	0	-	0	10	1	9	9
2	FCK	3	2	-	1	-	0	6	2	4	7
3	AaB	3	2	-	0	-	1	5	4	1	6
4	Lyngby	2	1	-	1	-	0	4	2	2	4
5	AB	3	1	-	1	-	1	4	4	0	4
6	OB	2	1	-	0	-	1	3	3	0	3
7	FCM	3	0	-	2	-	1	2	3	-1	2
8	Viborg	3	0	-	2	-	1	2	3	-1	2
9	Vejle	3	0	-	2	-	1	4	7	-3	2
10	Silkeborg	2	0	-	1	-	1	2	4	-2	1
11	Esbjerg	2	0	-	1	-	1	1	3	-2	1
12	AGF	3	0	-	1	-	2	1	8	-7	1

Støðan, danska 1. deild

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Frem	1	1	-	0	-	0	3	0	3	3
2	Farum	1	1	-	0	-	0	3	1	2	3
3	B93	1	1	-	0	-	0	2	1	1	3
4	Brønshøj	1	1	-	0	-	0	2	1	1	3
5	AC Horsens	1	1	-	0	-	0	1	0	1	3
6	B 1909	1	0	-	1	-	0	2	2	0	1
7	HFK Sønderj.	1	0	-	1	-	0	2	2	0	1
8	Køge	1	0	-	1	-	0	1	1	0	1
9	Herfølge	1	0	-	1	-	0	1	1	0	1
10	Randers F.	1	0	-	1	-	0	0	0	0	1
11	FC Aarhus	1	0	-	1	-	0	0	0	0	1
12	Hvidovre	1	0	-	0	-	1	1	2	-1	0
13	Fredericia	1	0	-	0	-	1	1	2	-1	0
14	B 1913	1	0	-	0	-	1	0	1	-1	0
15	Skive	1	0	-	0	-	1	1	3	-2	0
16	Kolding IF	1	0	-	0	-	1	0	3	-3	0

Støðan, norska tippeligan

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Rosenborg	10	9	-	0	-	1	35	9	26	27
2	Viking	10	8	-	2	-	0	22	9	13	26
3	Molde	10	6	-	2	-	2	25	14	11	20
4	Brann	10	6	-	1	-	3	31	17	14	19
5	Stabæk	10	6	-	1	-	3	17	16	1	19
6	Lillestrøm	9	5	-	1	-	3	16	14	2	16
7	Odd. Grenl.	9	4	-	2	-	3	15	10	5	14
8	Moss	10	4	-	1	-	5	12	19	-7	13
9	Sogndal	10	3	-	0	-	7	9	24	-15	9
10	Bodø/Glimt	10	2	-	2	-	6	11	18	-7	8
11	Bryne	10	2	-	2	-	6	10	17	-7	8
12	Lyn	10	1	-	3	-	6	13	20	-7	6
13	Tromsø	10	2	-	0	-	8	8	19	-11	6
14	Strømgodset	10	1	-	3	-	6	12	30	-18	6

Molde ætlar sær at vera meistari

Men seinasta hálva tíman var einki meistarasnið yvir spælinum hjá Jákupi Mikkelsen og teimum

TIPPELIGA
Jóannes Hansen

Molde hevur ongantíð vunnið norska meistaraskapin. Men nú ætla teir, at tað skal vera. Tað verður ikki í ár. Molde er á 8. plássinum, og tað er lítið sannlíkt, at teir skulu røkka heiðursmerkjum. Men teir ætla sær at royna eftir bronsuni.

Molde ætlar sær at vinna NM í seinasta lagið í 2005. Teir eru so væl nøgdir við venjaran, Gundar Bengtsson úr Svøríki, at teir ætla at leingja sáttmálan við hann fram til og við 2005.

Gunde Bengtsson er komin til Molde í ár, og sáttmálaskeiðið er til og við 2002. Venjarin sigur seg vera væl nøgdan við umstøðurnar:

– Mær dámar væl, at felagið miðjar høgt og hevur ambitiónir. Eg haldi ikki, at tað er veruleikafjart at tosa um NM í seinasta lagið í 2005, men so verður neyðugt at halda upp á spælararnar og at fáa nýggjar og góðar spælarar til felagið, er svarið hjá venjaranum, tá norskir fjølmiðlar fregnast um, hvat hann heldur um stóru ætlanirnar.

Lítið meistaraligt

Sunnudagin høvdu Jákup Mikkelsen og teir vitjan av botnliðnum úr Tromsø. Sum 1. hálvleikur leið bendi alt á, at heimaliðið skuldi vinna tryggan sigur. Teir 5.147 áskoðararnir sólaðu sær í sera tryggum verjuspæli og skjótum og hugflogsríkum álopssnildum, sum høvdu við sær, at Molde í 60. minutti økti til 3–0 og harvið tóktist hava staðfest tryggan sigur.

Men so var um reppið, at teir eftir lítlari løtu mistu alt á gólvið.

– Eina løtu roknaði eg vil, at Tromsø fór at vinna, ásannaði venjarin eftir lokið stríð, og tað var ikki so undarligt, at hann roknaði soleiðis.

Tromsø minkaði um munin tvær ferðir í nýggju minuttir. Í 72. minutti økti Molde til 4–2, men bara tveir minuttir seinni var 4–3, og síðsta korterið stóð tað nógv á hjá Jákupi og hinum í verjuni.

Deyðbóltarnir argaðu

Í Molde eru teir í løtuni ikki vinir við deyðbóltarnar. Fyrsta Tromsø málið kom eftir horna. Eftir stutta sending varð bólturin lagdur til handara stólpan, har ein maður var púra leysur, tá hann skoraði.

Tey bæði næstu málini komu eftir fríspark úr seytjan metrum. Í tí fyrra førinum spældu teir ímillum beinini á einum verjumanni og til ein púra leysan Tromsø mann, og í tí seinna førinum snittaði fríspark ein manngarðinum og snýtti harvið Jákup Mikkelsen fullkomuliga.

– Vit arbeiða nógv við at betra um verjuna í deyðbóltsstøðunum, og vit mugu bara vóna, at tað fer at eydnast betri, enn tað gjørdi hesa ferð, segði Molde venjarin, sum sjálvandi fegnaðist um, at tað eydnaðist at fáa øll stigini.

Higartil hevur Jákup Mikkelsen ikki roynt at tapa í landskappingini. Vónbrotið var tapið í steypakappingini. Í landskappingini hava teir spælt 1–1 ímóti Rosenborg, vunnið 1–0 í Moss og nú 4–3 á Tromsø. VG er pírið við skoðsmálunum til Molde spælararnar hesa ferð. Saman við fleiri liðfeløgum fær Jákup Mikkelsen ikki meiri enn eitt trý tal.

FM-kapping á Svangaskarði

FM í frælsum ítrótti var hildið leygardagin, 4. august, á Svangaskarði, og hjá fleiri av íðkarunum var talan um heilt góð úrslit

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
Tíðindaskriv

Leygardagin varð skipað fyri FM í frælsum ítrótti á Svangaskarði. Umstøðurnar at kappast vóru av teimum bestu. Sól og eitt lítið lot.

Hóast fá tóku lut, vóru fleiri góð úrslit og spennandi kappingar.

Skjótir rennarar

Bæði Heini Hátún og Ási Mikkelsen komu undir golmlu mettíðina á 100 m., men ov nógvur vindur var tað løtuna, teir runnu, so tíðin varð ikki góðkend sum met. Heini vann eisini kappingarnar í 400m og kúlustoyti. Ási vann kappingina í longdarlopi.

Hallur Holm og Guttorm Sørensen høvdu ein góðan dyst á 5000 m. Guttorm førdi meginpartin av teimum 5 km, men Hallur megnaði at fara framvið honum í endanum.

Fáar kvinnur

Hetta bragdið endurtók Hallur á 800 m. Evald við Garð vann uttan størri hóvasták kappingina á hesum teininum, men kappingin um annað pláss var hørð. Sølvi R. Hansen lá á odda eftir fyrra umgang, men varð síðan yvirhálaður av Evald. Tá einir 20 metrar restaðu í, fór Hallur tuskandi framvið við Guttormi Sørensen í hølinum. Einans 4/10 sek. vóru millum Hallur á øðrum plássi og Sølva á fjórða plássi.

Annars vóru sera fáar kvinnur við í FM-kappingini. Ingibjørg Poulsen vann kappingina á kúlustoyti, og bert 14-ára gamla Maria í Skorini Jacobsen vann 400m, 800m og 5000m. Í kappingunum á 800m og 5000m var hon einsamøll kvinna.

Úrslit:

100 m menn
1 Heini Hátún 11,0
2 Ási Mikkelsen 11,1
3 Hallgrím Hansen 12,0
4 Finn Hansen 12,0

400 m menn



Heini Hátún vann tríggjar kappingar, tá kappast var um FM í frælstum ítrórri
1 Heini Hátún 51,5
2 Evald við Garð 57,1
3 Finn Hansen 59,6

400 m kvinnur
1 Maria í Skorini Jacobsen 1.18,7
2 Naomi Enomoto 1.28,4

800 m menn
1 Evald við Garð 2.04,8
2 Hallur Holm 2.09,7
3 Guttorm Sørensen 2.09,9
4 Sølvi Reinert Hansen 2.10,1
5 Sigurð Justinussen 2.21,7
6 Suni Jacobsen 2.26,0

800 m kvinnur
1 Maria í Skorini Jacobsen 3.07,2

5000 m menn

Hallur Holm vann kappingina á 5.000 metrum, men leingi var tað Guttorm Sørensen, sum hevði leiðsluna
1 Hallur Holm 15.54,5 sek.
2 Guttorm Sørensen 15.57,9
3 Sigurð Justinussen 17.51,3
4 Niels Jákup Jakobsen 18.31,0
5 Suni Jacobsen 20.05,3
6 Regin Jóanesarson 22.46,3

5000 m kvinnur
1 Maria í Skorini Jacobsen 26.16,2

Kúlustoyt menn
1 Heini Hátún 12,74
2 Poul Guttesen 10,95
3 Hallgrím Hansen 9,93
4 Finn Hansen 9,83
5 Búgvi Poulsen 8,22

Kúlustoyt Kvinnur
1 Ingibjørg Poulsen 10,25
2 Randi Kúrberg 8,20

Longdarlop menn
1 Ási Mikkelsen 6,69
2 Finn Hansen 5,37
3 Hallgrím Hansen 5,32

Úrslit frá ólavsøkurenningini 2001

Menn, 5 km

Pláss	navn	Árg	Felag/Staður	tíð
1	Hallur Holm	67	Bragdið	15,57
2	Guttorm Sørensen	68	Treysti	16,07
3	Bogi Lenvig	81	Bragdið	17,09
4	Sigurð Justinussen	67	Bragdið	17,31
5	Cecil Weihe	65	Bragdið	17,42
6	Freddie Poulsen	71	Bragdið	18,06
7	Hallur Stakksund	78	Bragdið	18,18
8	Martin Arnsbjørn	74	MÍF	18,53
9	Hilmar Danielsen	77	Tórshavn	19,00
10	Jónálvur Johannesen	74	Kollafjørður	19,07
11	Jonhard Larsen	66	Treysti	19,22
12	Tróndur Kragesten	87	Tórshavn	19,25
13	Martin Rói Vilhelmsen	86	Tórshavn	19,26
14	Óli Olsen	49	Bragdið	19,29
15	Michi Bangstrup	62	Vestas	19,47
16	Jesper Gjørup	70	Danmark	19,50
17	Birgir Sondum	61	Bragdið	20,03
18	Hanus Højgaard	60	Hoyvík	20,15
19	Tummas P. Djurholm	80	Hoyvík	23,20
20	Sophus Edvard Dal-Christiansen	69	Tórshavn	20,28
21	Robert Vilhelmsen	51	Bragdið	20,37
22	Ólavur Olsen	43	Bragdið	20,37
23	Høgni Vilhelmsen	76	Tórshavn	20,44
24	Bárður Person	70	Tórshavn	21,10
25	Jón Kragesten	60	Tórshavn	21,22
26	Harry Hansen	38	Roysnið	21,41
27	Kelvin Bulteel	48	Ongland	22,22
28	John Thorogood	48	Skotland	22,57
29	Regin Jóanesarson	45	Vestmanna	23,10
30	Marek Makiewicz	48	Hoyvík	25,43
31	Jóan Petur Michelsen	67	Tórshavn	26,24

Kvinnur, 5 km

Pláss	navn	Árg	Felag/Staður	tíð
1	Sunnuvá Bjarnastein	68	Bragdið	20,08
2	Anna Herup Høgnesen	83	Hoyvík	20,41
3	Jóngerð Høgnesen	48	Hoyvík	23,56
4	Maria í Skorini Jacobsen	87	Treysti	24,11
5	Bryndis Weihe	68	Bragdið	24,19
6	Sigga Jóanesarson	74	Vestmanna	26,56
7	Anna Elisabeth Jónsdóttir	59	Ísland	29,45

Dreingir 10-13 ár, 1168 m

Pláss	navn	Árg	Felag/Staður	tíð
1	Karl Herup Olsen	88	Tórshavn	3,53
2	Gunnar T. Í Dali	90	Trongisvágur	3,55
3	Jón Gregersen	88	Sandavágur	4 ,02
4	Dánjál Davidsen	88	Tórshavn	4,07
5	Bárður Johannesen	89	Argir	4,09
6	Rógvi Holm	90	Argir	4,16
7	Jan Elmar Sørensen	91	Treysti	4,25
8	Jógvan Rói Davidsen	91	Tórshavn	4,28
9	Hanus Mortensen	91	Øravík	4,30
10	Josef Hansen	89	Sørvágur	4,31
11	Fróði Mortensen	90	Hoyvík	4,32
12	Hugin Brend Bech	90	Tórshavn	4,33
13	Niels Martin Johannesen	91	Argir	4,37
14	Hjalmar Johannesen	90	Tórshavn	4,40
15	Bjartur Olsen	91	Tórshavn	4,42
16	Brian Vang	91	Hoyvík	4,42
17	Andrias Nielsen	90	Sandavágur	4,47
18	Alex Henning Mellemgaard	91	Argir	4,48
19	Tummas Justinussen	90	Argir	4,58
20	Høgni Svabo	91	Miðvágur	5,00
21	Jógvan Jacobsen	89	Tórshavn	5,02
22	Teitur Magnussen	91	Hoyvík	5,11
23	Fróði Gregersen	90	Sandavágur	5,27
24	Andre Klein	91	Odense	5,31
25	Jón Bentsson Jakobsen	91	Hoyvík	5,39
26	Borgar J. Stórá	91	Vestmanna	5,53

Gentur 10-13 ár, 1168 m

Pláss	navn	Árg	Felag/Staður	tíð
1	Marin Í Dali	89	Trongisvágur	3,59
2	Helga Djurhuus	89	Tórshavn	4,10
3	Barbara Tausen	89	Hoyvík	4,22
4	Randi Jacobsen	89	Tórshavn	4,31
5	Jenny Svabo	90	Miðvágur	4,34
6	Karina Hansen	89	Treysti	4,53
7	Rudi Zachariassen	89	Streymnes	4,54
8	Elin Stakksund	89	Tórshavn	5,17
9	Kristianna Dal Jákupsdóttir	91	Bragdið	5,18
10	Christa P. Weihe	91	Bragdið	5,36

Dreingir 9 ár og yngri, 584 m

Pláss	navn	Árg	Felag/Staður	tíð
1	Gilli Rólantsson	92	Trongisvágur	2,02
2	Rógvi Egilstoft Nielsen	92	Sandavágur	2,02
3	Ari Johannesen	92	Argir	2,03
4	Olivur Debes Eiriksfoss	92	Bragdið	2,07
5	Tóri Debes	92	Tórshavn	2,08
6	Brian Djurhuus	92	Streymnes	2,11
7	Jógvan Ólavsson	92	Argir	2,12
8	Hallur Hansson	92	Argir	2,16
9	Teitur Hansen	92	Treysti	2,18
10	Torkil Petersen	92	Tórshavn	2,18
11	Bergur Joensen	92	Tórshavn	2,21
12	Kristian Gunnarsson	92	Tórshavn	2,21
13	Jóhan á Plógv Hansen	94	Tórshavn	2,22
14	Thomas Knudsen	93	Tórshavn	2,25
15	Rúni Seloy	94	Tórshavn	2,29
16	Tróndur Djurhuus	92	Tórshavn	2,29
17	John Viljam Johannesen	95	Treysti	2,31
18	Agnar Frederiksen	92	Klaksvík	2,34
19	Tóri Jacobsen	93	Tórshavn	2,35
20	Martin Nielsen	92	Hoyvík	2,36
21	Rógvi Christiansen	93	Tórshavn	2,36
22	Fríði Mellemgaard	95	Tórshavn	2,39
23	Tummas Sigvardsen	92	Tórshavn	2,40
24	Daniel Klein	94	Odense	2,41
25	Símun Petur Venned	93	Tórshavn	2,41
26	Helgi Finnsson	93	Tórshavn	2,42
27	Meinhard Dahl-Olsen	93	Tórshavn	2,42
28	Palli Dalsgaard	93	Tórshavn	2,43
29	Edvard Vang	93	Hoyvík	2,44
30	Bárður Stórá	94	Vestmanna	2,44
32	Hallur Højgaard	93	Runavík	2,46
33	Pætur Næs Guttesen	93	Hoyvík	2,55
34	Páll R. Weihe	95	Bragdið	2,57
35	Ellendur á Lag	94	Tórshavn	3,00
36	Niklas Magnussen	95	Hoyvík	3,01
37	Pætur Sigvardsen	94	Tórshavn	3,14
38	Hjørtur Rasmussen	96	Hoyvík	3,20
39	Teitur Bjarnastein Jacobsen	97	Bragdið	3,25
40	Martin Justinussen	96	Brøndby	3,42
41	Steingrímur Hallsson	97	Bragdið	3,42
42	Beinir Johannesen	97	Treysti	3,43
43	Jákup Nielsen	96	Hoyvík	3,46
44	Jósvein Joensen	96	Klaksvík	4,01
45	Jákup Ólavsson	95	Argir	4,39

Gentur 9 ár og yngri, 584 m

Pláss	navn	Árg	Felag/Staður	tíð
1	Helena Højgaard Poulsen	92	København	2 06
2	Bjørg Seloy	92	Tórshavn	2,07
3	Hildur á Plógv Hansen	92	Tórshavn	2,20
4	Helena G. Jacobsen	93	Tórshavn	2,21
5	Vilbjørg Johannesen	92	Treysti	2,22
6	Maria Holm Lund	92	Ribe	2,23
7	Vár Gregersen	93	Sandavágur	2,33
8	Gunnvá Justinussen	94	Glyvrar	2,37
9	Jenny Kragesten	92	Tórshavn	2,40
10	Barbara Debes Eiriksfoss	95	Bragdið	2,40
11	Gunnrið Fríða Joensen	94	Klaksvík	3,09
12	Guðrið Justinussen	92	Tórshavn	3,11
13	Linda Zachariassen	94	Hoyvík	3,13
14	Olga Maria Gullaksen	92	Klaksvík	3,24
15	Krista Áargarð	96	Tórshavn	3,50
16	Barbara Eysturoy	94	Tórshavn	3,56
17	Catharina Holm Lund	96	Ribe	3,58
18	Súsanna Zachariassen	97	Tórshavn	4,14
19	Kamilla Garð Sørensen	98	Treysti	5,20
20	Karin Holm Simonsen	99	Hoyvík	7,13